HEILSUMÁLARÁÐIÐ

10. januar 2013
Mál: 10/00753-16
Viðgjørt: Símun J. Hansen

Uppskot

til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)**

**§1**

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 44 frá 8. mai 2012, verða hesar broytingar gjørdar.

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*stk. 2.* Persónar, skrásettir í landsfólkayvirlitinum, hava rætt til veitingar sambært hesi lóg".

2) § 2 og yvirskrift verður strikað.

3) Í § 3 verður sum stk. 4 sett: "*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur nærri reglur um, at Heilsutrygd rindar útreiðslur til neyðugan tolk í sambandi við viðtalu hjá kommunulækna."

4) Yvirskriftin til § 10 verður orðað soleiðis: "Hjálparráð".

5) § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Heilsutrygd rindar fyri hjálparráð, sum er liður í einari viðgerð, ella sum eru til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráðið."

6) § 10, stk. 3 verður orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur sambært stk. 1-2."

7) Í § 12, stk. 2 verður "Heilsutrygd" broytt til: "Landsapotekarin".

8) Í § 18, stk. 3 nr. 4 verður "4.000" kr. broytt til: "5.300 kr."

9) Í § 18 stk. 3 nr. 5 verður orðað soleiðis: "100% av tí partinum, sum fer upp um 2.380 kr. fyri persónar, sum eru fyltir 67 ár."

10) Í § 18, stk. 3 verður aftaná nr. 5 sum nýtt nr. sett: "6) Børn og ung upp til 18 ár gjalda ikki egingjald."

11) Yvirskriftin til § 27 verður orðað soleiðis: "Samráðingar".

12) § 27 verður orða soleiðis: "Fíggjarmálaráðið stendur fyri sáttmálasamráðingum við avvarðandi fakfeløg.
*Stk. 2.* Møguligar útreiðslur í samband við samráðingar vera goldnar av Fíggjarmálaráðnum."

13) § 28 og yvirskrift verður strikað.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo

**§2**
Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 2013

**§3**
Skiftisreglur

**Kap. 1 Almennar viðmerkingar**
Heilsutrygdarlógin varð sett í gildi 1. januar 2010. Eftir at lógin hevur virkað í meira enn 2 ár, er tørvur á at ymiskar rættingar og dagføringar verða gjørdar í lógini. Dagføringarnar eru neyðugar fyri at lógin kann virka samsvarandi galdandi mannagongdum.

Samanlagt er talan um 13 broytingar:

1) Karantenan í § 1 stk. 2 verður avtikin. Persónar, sum flyta til Føroya verða fevndir av teimum skyldum og rættindum, sum lógin ásetur, frá tí degi tey eru skrásett í landsfólkayvirlitinum.

   Heilsutrygdarlógin ger greitt, at ein og hvør, sum flytur til Føroya frá einum landi uttanfyri ríkið, skal í karantenu í 6 vikur. Heilsutrygd upplýsir, at henda áseting er trupul at umsita og kann eisini vera til óneyðugan ampa fyri persónar, sum arbeiða í vælgerandi felagsskapum og lesandi, sum flyta heim fyri eitt stutt tíðarskeið.

   Í Danmark hava bæði danskir ríkisborgarar og útlendingar rætt til veitingar á heilsuøkinum, frá tí degi teir eru skrásettir í danska landsfólkayvirlitinum. Tvs. har er eingin karantena fyri persónar, sum hava búsett seg í Danmark, ella fingið arbeiðs- og uppihaldsloyvi í landinum.

   Ætlanin er, at greinin verður broytt soleiðis at karantenan verður avtikin, men at persónar, sum flyta til Føroya, framvegis skulu verða skrásettir í landsfólkayvirlitinum, fyri at vera umfataðir av teimum rættindum og skyldum, sum heilsutrygdarlógin ásetur.

2) § 2 í lógini verður strikað. Tað hevur leingi verið ætlanin at gera avrokningarskipanina hjá Heilsutrygd talgilda, soleiðis at sleppast kann undan pappírskvittanum hjá læknum, tannlæknum o.s.fr., samstundis sum eftirkanningararbeiðið hjá Heilsutrygd kann gerast tryggari og lættari at umsita. Tá ið arbeitt varð við heilsutrygdarlógini av fyrstan tíð, varð mett, at eitt heilsutrygdarkort var besta loysnin til hetta endamál, og tí varð tað sett inn í lógina. Men í dag má ásannast at tíðin helst er farin frá heilsutrygdarkortinum, og at tað helst finnast aðrar, betri og bíligari loysnir.

   Landsstýrismaðurin ætlar at avtaka ásetingina soleiðis, at loysnin við at gera avrokningina hjá læknum o.ø. talgilda, ikki verður tengt at einum heilsutrygdarkorti, men at aðrir møguleikar verða kannaðir nærri og best egnaða loysnin verður sett í verk. Arbeiðið fer at taka tíð, men sum støðan er nú, er tað týdningarmikið at rætta

loysnin verður vald, sum á besta hátt kann tryggja borgaranum bestu tænastu, og veitarum eina trygga avrokningarskipan.

3) Sum er, veitir lógin heimild fyri tolki í samband við viðtalu og viðgerð hjá serlækna. Hetta verður ikki mett at vera nøktandi. Tí verður tænastan eisini sett til at umfata kommunulæknar.

4) Í samband við broytingina í § 10, verður yvirskriftin til greinina strikað.

5) Ásetingin í § 10, sum regulerar hvussu ískoyti til hjálparráð verður veitt, verður broytt og gjørd greiðari. Heilsutrygdarlógin ásetur, at ískoyti verður veitt til hjálparráð. Hetta kann misskiljast, tí í veruleikanum rindar Heilsutrygd allar útreiðslur í sambandi við hjálparráð, sum verða útflýggjað í sambandi við viðgerð í heilsuverkinum.

   Heilsutrygd vísir á, at útreiðslurnar til hjálparráð eru hækkaðar munandi, og at málsviðgerðin eisini er nógv økt. Tí er neyðugt við einum lista yvir hjálparráð, sum kunnu verða flýggjað út. Eisini er neyðugt við eini áseting um eitt møguligt egingjald og/ella depositum.

   Landsstýrismaðurin ynskir at broyta ásetingina, so hon ikki kann misskiljast. Tað vil siga, at tað greitt skal framganga, at Heilsutrygd rindar fyri hjálparráð.

6) Av tí at útreiðslurnar til hjálparráð eru hækkaðar munandi síðan Heilsutrygd var sett á stovn, ynskir landsstýrismaðurin at tálma útreiðslunum í sambandi við hjálparráð, við í § 10 stk. 3, at áseta eina generella heimild í lógina um, at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur sambært stk. 1-2. Landsstýrismaðurin kann nýta hesa heimild um tað vísir seg, at ein listi skal gerast yvir hjálparráðini, sum Heilsutrygd veitir, ella eitt møguligt egingjald og/ella depositum skal ásetast.

   Viðmerkjast skal eisini, at tá Heilsutrygd varð sett á stovn, var ein av grundgevingunum fyri at seta Heilsutrygd á stovn, at vit við skipanini fingið betri innlit í útreiðslurnar á økinum. Hendan broytingin í lógini er eitt úrslit av at Heilsutrygd týðiliga hevur gjørt vart við at útreiðslurnar til hjálparráð eru øktar munandi og at okkurt má gerast fyri at tálma útreiðslunum. Hetta vil ikki siga at skipanin gerst verri, ella at borgarin verður við svið og soð, men heldur at játtanin verður betri umsitin.

7) Lógin ásetur í § 12, at Heilsutrygd skal veita skrivara til tilskotsnevndina. Sum skipanin virkar í dag, veitir Landsapotekarin, eftir avtalu við Heilsutrygd, skrivara til tilskotsnevndina, serliga tí at servitan krevst av skrivaranum. Rokning verður send Heilsutrygd fyri útreiðslurnar, sum Landsapotekarin hevur av skrivarauppgávuni.

   Ætlanin er at broyta ásetingina um tilskotsnevndina, so Landsapotekarin, og ikki Heilsutrygd, veitir skrivara til tilskotsnevndina. Harvið fer greinin at vera í samsvar við verandi mannagongd. Heilsutrygd skal framvegis gjalda fundarpeningin til limirnar í nevndini, men játtanin fyri skrivaran verður flutt frá Heilsutrygd til Landsapotekaran.

8-10) § 18 ásetur støddina á tilskotinum, sum verður veitt til keyp av tilskotsheimilaðum heilivági, sum er mest vanligi heilivágurin í viðgerðunum, sum verða veittar í Føroyum. Skipanin treingir tó til eina dagføring, tí foreldur, sum hava fleiri børn, ið tørva heilivág, gjalda lutfalsliga nógv í egingjaldi fyri tilskotsheimilaðan heilivág.

Foreldur, sum hava fleiri børn, ið tørva heilivág, skulu gjalda fult egingjald fyri hvørt barnið sær. Hetta hevur víst seg at vera óheppið. T.d. kunnu stakar mammur í ringasta føri koma út fyri at gjalda egingjald fyri fleiri børn í desember. Eisini er tað ikki heilt óvanligt at ein familja hevur fleiri børn, sum hava tørv á tilskotsheimilagum heilivági.

Børn skulu framyvir ikki gjalda so nógv, sum tey gera við verandi skipan. Hetta fer at lætta um hjá foreldrum at børnum, sum hava brúk fyri tilskotsheimilaðum heilivági. Nýggja skipanin líkist skipanini í Norra, men verður munandi betri fyri barnið enn danska skipanin, sum líkist verandi skipan í Føroyum.

Ásetingin í § 18 verður broytt, so børn undir 18 ár ikki gjalda egingjald fyri tilskotsheimilaðan heilivág.Samstundis verður heilivágsstigin broyttur soleiðis at broytingin verður útreiðsluneutral. Hetta verður gjørt soleiðis, at heilivágsstigin í § 18 verður broyttur so persónar millum 18 og 67 ár og sum raka loftið í skipanini, skulu gjalda í mesta lagi 325 kr. meira um árið.

11) Yvirskriftin verður broytt so hon svarar til § 27.

12) Samráðingarnevndin hevur virkað í tvey ár og tveir sáttmálar eru avgreiddir. Í løtuni eru samráðingar við Serlæknafelagið um nýggjan sáttmála.

Í lógaruppskotinum verður mælt til at broyta ásetingina um eina sáttmálanevnd, og at landsstýrismaðurin í heilsumálum skal góðkenna sáttmálarnar. Ætlaða broytingin hevur við sær, at uppgávan at gera sáttmálar, verður flutt frá samráðingarnevndini til Fíggjarmálaráðið. Orsøkirnar til ætlaðu lógarbroytingina eru fleiri. Fíggjarmálaráðið hevur ábyrgd av landsins arbeiðsgevaraheimildum, ið viðvíkja lønarviðurskiftum og setanartreytum, herundir sáttmálasamráðingar við fakfeløgini á tí almenna arbeiðsmarknaðinum. Mett verður, at tað er rættast, at tað er ein almennur sáttmálapartur, sum hevur um hendi at samráðast um starvs- og lønarviðurskifti hjá teimum ymsu yrkisbólkunum, sum virka á tí partinum av arbeiðsmarknaðinum, sum er antin heilt ella partvíst alment fíggjaður. Um fleiri aðalráð ella samráðingarnevndir hvør í sínum lagi standa fyri sáttmálasamráðingum, kann hetta hava við sær, at lønarlagið v.m. í teimum ymsu sáttmálunum verður ymiskt. Ítøkiliga er tað Lønardeildin undir Fíggjarmálaráðnum, sum hevur nevndu arbeiðsgevaraheimild sum virkisøkið. Hetta hevur við sær, at Lønardeildin hevur serkunnleika og harvið eisini serførleika innan hetta økið. Lønardeildin er tann innan almenna við størst kunnleika til viðkomandi starvs- og arbeiðsmarknaðarviðurskifti sum heild í Føroyum.

13) § 28 verður strikað. Ætlanin við ásetingini var at samstarvsnevndirnar skuldu hava til uppgávu at tulka sáttmálar á heilsuøkinum. Ivi hevur til tíðir verið um grásonuna millum samráðingarnevndina og samstarvsnevndina, og framyvir kann hetta hava óhepnar fylgjur og misskiljingar við sær. Landsstýrismaðurin metur, at nevndirnar eru

óneyðugar og at partarnir sjálvir eiga at áseta í sáttmálanum, hvussu teir sínámillum vilja tulka sáttmálarnar og hvussu farast skal fram, um ósemjur í sambandi við sáttmálarnar stinga seg upp.

## Kap 2. Avleiðingar av broytingaruppskotinum

### Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar

Mett verður ikki, at uppskotið í síni heild kemur at hava við sær stórvegis fíggjarligar avleiðingar.

Tað er líkt til at peningur verður spardur av at umskipa umsitingina av hjálparráðum. Samstundis kann roknast við, at umskipanin av egingjaldinum til børn, fer at hava við sær, at útreiðslurnar til heilivágsískoytið vaksa eitt vet.

Umskipanin, av keypi av heilivági uttanlands, kemur eisini at hava við sær eina sparing, tí skipanin verður gjørd einfaldari, og heilivágurin verður ikki sendur aftur og fram millum londini, men keyptur á staðnum frá sjúkrahúsverkinum í tí landinum, har sjúklingurin verður viðgjørdur.

Niðanfyri verður mett um fíggjarligu avleiðingarnar fyri hvørja einstaka broyting:

Ad 1.) Broytingin hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar við sær. Spart verður í arbeiðsorku og málsviðgerð. Um ein persónur flytur til Føroya skal hann gjalda til Heilsutrygd frá tí degi viðkomandi verður skrásettur í landsfólkayvirlitinum. Hetta hevur við sær økta inntøku til Heilsutrygd. Ein avmarka meirútreiðsla verður í samband við at persónar, sum flyta til Føroya, hava brúk fyri veitingunum í heilsutrygdarlógini innanfyri 6 vikur.

Ad 2.) Sjálvt um § 2 verður strikað, verður neyðugt at nýta pening til at gera avrokningarskipanina hjá Heilsutrygd smidligari. Mett verður at 3. mió afturat skulu nýtast til at framleiða nýggju skipanina. Hinvegin fer nýggja skipanin at spara tíð og pening hjá læknum, tannlæknum o.ø., samstundis sum Heilsutrygd kemur at hava ein munandi lættari rakstur á økinum.

Ad 3.) Heilsutrygd upplýsir at í 2012 var penngur ikki veittur til tolk, í samband við vitjan hjá serlækna. Mett verður at talan verður um eina avmarkaða upphædd, niðanfyri 100.000 kr., sum skal veitast til tolk í samband við vitjan hjá kommunulækna.

4 og 5.) Broytngarnar koma ikki at hækka útreiðslurnar til hjálparráð, tí sum støðan er í dag rindar Heilsutrygd fyri hjálparráð. Tó kann ein listi yvir hjálparráð, sum Heilsutrygd rindar fyri, gera at útreiðslurnar hjá Heilsutrygd til hjálparráð lækka. Eisini kann eitt depositum gera at hjálparráð vera borin aftur.

6) Mett verður at landsstýrismaðurin hevur møguleika at tálma útreiðslunum í sambandi við hjálparráð. Nærri kanningar skulu gerast áðrenn mannagongdir skulu broytast.

Ad 7.) Broytingin hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær. Játtanin til skrivaran verður flutt frá Heilsutrygd til Landsapotekarin.

Ad 8-10. ) Útrokningar hjá Heilsutrygd og Apoteksverkinum vísa, at tað kostar uml. 1,5 mió. at avtaka egingjaldið hjá børnum yngri enn 18 ár.

Umleið henda upphædd verður spard, um seinasta stigið á tilskotsstiganum (16 – 67 ár) verður hækkað frá 4.000 kr. til 5.300 kr..

Hesin bólkur fær 75% tilskot av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.000 kr. og upp til 5.300 kr., og 100% av tí partinum sum fer upp um 5.300 kr..

Hetta merkir, at tey sum keypa fyri meira enn kr. 5.300, fáa eina útreiðslu á kr. 325,- afturat um árið.

Ad 11. og 12.) Broytingin hevur ongar fíggjarligar útreiðslur við sær. Starvsfólk á Heilsumálaráðnum, Heilsutrygd og Fíggjarmálaráðnum hava síðan 1. jan 2010 staðið fyri samráðingunum. Peningur hevur ikki beinleiðis verið settur av til arbeiðið.

Ad 13.) Broytingin hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Í sambandi við broyting nr. 9 kemur Fíggjarmálaráðið at hava ein størri leiklut í samráðingarnevndini enn í dag. Fundir hava verið við Fíggjarmálaráðið, sum eisini hevur góðkent orðingina og viðmerkingarnar til broytingina.

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur við sær jaligar avleiðingar fyri familjur at børnum, sum hava tørv á tilskotsheimilaðum heilivági, meðan tey sum keypa fyri meira enn kr. 5.300, fáa eina útreiðslu á kr. 325,- afturat um árið.

**Millumtjóða sáttmálar**
Uppskotið hevur ongar beinleiðis avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar. Tó skal viðmerkjast, at karantenan í § 1 verður avtikin, so føroyingar og útlendingar verða javnsettir tá tað kemur til veitingar og skyldur sambært heilsutrygdarlógini. Einasta krav verður at viðkomandi er skrásettur í landsfólkayvirlitinum.

**Avleiðingar fyri stovnar**
Landsapotekarin kemur at hava útreiðslurnar til skrivarin hjá tilskotsnevndini. Játtanin til skrivaran verður flutt frá Heilsutrygd og til Landapotekarin.

**Skyldur álagdar borgarum**
Ongar skyldur vera álagdar borgarum í sambandi við broytingaruppskotið.

**Heimildir til annan landsstýrismann ella kommunur**
Samráðingarnar vera fluttar í Fíggjarmálaráðið.

**Talva – Avleiðingar**

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | ja | nei | nei | ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | ja | nei | nei | nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | nei | nei | nei | nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | nei | nei | nei | nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | nei | nei | nei | ja | |

**Kap. 3 Serligar viðmerkingar**

***Til § 1, stk. 2***
Verandi áseting í § 1 stk. 2 verður umorðað soleiðis, at persónar, skrásettir í landsfólkayvirlitinum, hava rætt til veitingar frá tí degi tey eru skrásett í landsfólkayvirlitinum.

**Til § 2**
§ 2 verður strikað. Tá ið arbeitt varð við heilsutrygdarlógini av fyrstan tíð, varð mett, at eitt heilsutrygdarkort var besta loysnin til hetta endamál, og tí varð tað sett inn í lógina. Men í dag má ásannast at tíðin helst er farin frá heilsutrygdarkortinum, og at tað helst finnast aðrar, betri og bíligari loysnir. Ein komandi loysn verður ikki tengt at einum heilsutrygdarkorti.

**Til § 3**

Í § 3 verður aftaná stk. 3 sett: "*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetur reglur um, at Heilsutrygd rindar útreiðslur til neyðugan tolk í sambandi við viðtalu hjá kommunulækna." Hetta tí at verandi lóg kann skiljast soleiðis, at tolkur bert verður veittur til viðtalu hjá serlækna og ikki til kommunulækna. Hetta verður rættað.

**Til § 10**
Yvirskriftin verður bryytt til "Hjálparráð". Og § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Heilsutrygd rindar fyri hjálparráð, sum er liður í einari viðgerð, ella sum eru til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráðið". Ásetingin í § 10, sum regulerar hvussu ískoyti til hjálparráð verður veitt, verður hervið broytt og gjørd greiðari. Heilsutrygdarlógin ásetur, at ískoyti verður veitt til hjálparráð. Hetta kann misskiljast, tí í veruleikanum rindar Heilsutrygd allar útreiðslur í sambandi við hjálparráð, sum verða útflýggjað í sambandi við viðgerð í heilsuverkinum. Orðingin skal tí skiljast sum ein dagføring av lógini, so hon svarar til galdandi mannagongdir á økinum.

**Til § 10 stk 3**
§ 10 stk. 3 verður orðað soleiðis: "*stk. 3* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur sambært stk. 1-2.". Hetta fyri at møguleiki í framtíðini skal vera fyri at tálma útreiðslunum í samband við hjálparráð. Úreiðslurnar til hjálparráð eru hækkaðar munandi seinastu árini og heldur vøksturin fram mugu tiltøk setast í verk. Talan kann vera um ein positivlista ella um t.d. depositum.

**Til § 12 stk. 2**
Í § 12, stk. 2 verður "Heilsutrygd" broytt til: "Landsapotekarin". Sum skipanin virkar í dag, veitir Landsapotekarin, eftir avtalu við Heilsutrygd, skrivara til tilskotsnevndina, serliga tí at servitan krevst av skrivaranum. Ásetingin verður broytt, so Landsapotekarin, og ikki Heilsutrygd, veitir skrivara til tilskotsnevndina. Harvið fer greinin at vera í samsvar við verandi mannagongd. Heilsutrygd skal framvegis gjalda fundarpeningin til limirnar í nevndini, men játtanin fyri skrivaran verður flutt frá Heilsutrygd til Landsapotekaran.

**Til § 18**
Ásetingin í § 18 verður broytt, so børn undir 18 ár ikki gjalda egingjald fyri tilskotsheimilaðan heilivág, og samstundis verður heilivágsstigin broyttur, soleiðis at broytingin verður útreiðsluneutral.Foreldur at fleiri børnum, ið tørva heilivág, gjalda fult egingjald fyri hvørt barnið sær. Hetta hevur víst seg at vera óheppið. T.d. kunnu stakar mammur í ringasta føri koma út fyri at gjalda egingjald fyri fleiri børn í desember. Tí verður § 18 broytt, so at børn ikki skulu gjalda egingjald. Henda skipan lættir harvið um hjá foreldrum at børnum, sum hava brúk fyri tilskotsheimilaðum heilivági.
Skipanin verður broytt soleiðis, at heilivágsstigin í § 18 verður broyttur, so persónar millum 18 og 67 ár og sum raka loftið í skipanini, skulu í mesta lagi gjalda 325 kr. meira um árið.
Á hendan hátt verður betra um verandi skipan, so børn upp til 18 ár ikki skulu gjalda fyri tilskotsheimilaðan heilivág frá tí at lógin kemur í gildi.

**Til § 27**
Yvirskriftin verður broytt til "Samráðingar", og í § 27 verða stk. 1 og 2 strikað. Í staðin verður sett: "Fíggjarmálaráðið stendur fyri sáttmálasamráðingum við avvarðandi fakfeløg." Fíggjarmálaráðið og Heilsumálaráðið eru komin ásamt um, at best er at allar samráðingar

liggja í Fíggjarmálaráðnum. Tí verður ásetingin broytt. Fíggjarmálaráðið fer framyvir at hava ábyrgdina av samráðingunum við avvarandi fakfeløg.

**Til § 28**

§ 28 verður strikað, tí mett verður ikki at tað er neyðugt við eini samstarvsnevnd. Partarnir kunnu sjálvir áseta í sáttmálanum, hvussu teir sínámillum vilja tulka sáttmálarnar og hvussu farast skal fram, um ósemjur í sambandi við sáttmálarnar stinga seg upp. Mett verður at skipanin við eini samstarvsnevnd eisini er ov tung at umsita, og førir hon við sær óneyðugar seinkingar í málsviðgerð.

Heilsumálaráðið, tann xxx

Karsten Hansen
landsstýrismaður

Jóanis Erik Køtlum